Klaksvíkar Sjúkrahús



# ÁRSFRÁGREIÐING 2017

**1. Leiðslufrágreiðing....................................................................3**

**2. Roknskaparreglur ......................................................................5**

2.1. Játtanarroknskapurin ....................................................................7

2.2. Fíggjarstøðan 31. desembur 2017 ....................................................9

2.3. Eventualskyldur .........................................................................9

2.4. Ársfrágreiðing (tølini)....................................................................10

**3. Váttan frá leiðsluni......................................................................11**

**4. Váttanir frá óheftum grannskoðara.................................................12**

**5. Standard- og Artsroknskapur ........................................................14**

5.1. Viðmerkingar til roknskapin (artskonto) ...........................................14

5.2. Artskontobólkaroknskapur.............................................................16

**6. Hagtøl v.m. .................................................................................17**

6.1. Viðgerðir, innlagdir og ambulantir sjúklingar.....................................17

6.2. Sjúklingar sendir til útlendsk viðgerðarstøð .....................................19

6.3. Yvirlit yvir sjúklingar ....................................................................20

# 1. Leiðslufrágreiðing

Árið 2017 fer at standa sum eitt ár við fagnaði og viðgongd, men eisini sum eitt ár har vit staðfestu, at nýggjar og truplar avbjóðingar standa fyri framman.

## Trygd og Dygd

Fyrst í 2017 fingu vit aftur vitjan av IKAS. Sum kunnugt er IKAS tann fyritøkan, ið vegna donsku heilsumyndugleikarnir, stendur fyri eini góðskugóðkenning av sjúkrahúsunum. Arbeitt verður eftir "den danske kvalitetsmodel", stytt DDKM. Vit kalla skipanina "Trygd og Dygd" og eftir at hava arbeitt við at fáa hesa skipan setta í verk í eitt longri tíðarskeið, 1½ ár, var tað spennandi teir dagarnar tá IKAS loksins vóru her í Føroyum og høvdu okkum uppi til "próvtøku". Aftaná nakrar dagar við kanningum, samrøðum og tillagingum, vórðu vit øll boðin til fundar av IKAS fólkunum. Hetta gjørdist ein sera hugalig løta har tey einans høvdu gott at bera okkum, og har tað næstan bara vóru rósandi orð á skránni. Nakrar vikur seinni fingu vit skreytblað við endaligari góðkenning (akkreditering).

## Umbygging og ístandsetan

Í 2017 fingu vit eina løgujáttan, 1,5 mió. kr., til ístandsetan av skaðastovuni og øðrum hølum, umframt til umbygging av høvuðsinngongdini millum Norðoya Røktarheim og sjúkrahúsið. Her rendu vit okkum í ein heldur óvanligan trupulleika. Tað vísti seg, at arbeiðsmegin ikki var tøk. Teir veitarar, ið vóru við tá umbyggingin fór fram millum 2013 og 2015, og sum eisini hava gjørt partar av arbeiðnum á ambulatoriudeildini, og sum tí kenna húsið út og inn - teir fingu ikki "manna lið". Við ársenda stóðu vit tí við eini játtan, har bert ein fimtapartur var nýttur. Vónandi fáa vit gjørt arbeiðið liðugt í 2018.

Arbeiðið og ætlaninar við at umbyggja "gula hús" til neurologiskan endurvenjingarstovn, heldur fram. Væntandi verður peningur játtaður í 2018 og 2019, soleiðis at arbeiðið kann gerast. Arbeitt hevur verið við neurologiskum sjúklingum í nøkur ár. Úrslitini eru góð hóast trongar og truplar umstøður.

## Menningarætlanin og heildarætlanin fyri Norðurøki

Tvey tey síðstu árini hevur nógv fundarvirksemið verið, har samstarv og menning millum ymiskar partar hava staðið ovast á skránni. Fyrst og fremst er talan um at vit skulu venja okkum við "eitt sjúkrahúsverk" og venja okkum av við at tosa um trý ymisk sjúkrahús. Bygnaðurin og leiðsla verður broytt í hesum sambandi, og við ársenda 2017 varð endaliga avgjørt í Heilsumálaráðnum hvussu leisturin skal síggja út. Tær fyrstu stóru broytingarnar skulu fremjast sum skjótast, t.d. við felags visitatión, felags bíðilistar v.m. Eisini skulu sjúkrahúsini í nógv størri mun, samstarva og hjálpast at. Nógv av málunum

í menningarætlanini eru væl kend millum starvsfólkið í verkinum, men nú skal nakað veruligt gerast við avbjóðingarnar. Tað er ikki vist at uppgávan er so einføld, men avgerðin er tikin!



Eisini er ætlanin at fremja tíðandi partar av lokalu heildarætlanini, sum vit á sjúkrahúsinum aktivt hava luttikið í at festa á blað. Sum skilst, verður peningur játtaður til broytingar av ymsum slag.

## Virksemið

Dagliga virksemið á sjúkrahúsinum broytist ikki nógv í innihaldi, men talið av viðskiftafólkum økist. Vit royna, í tann mun tað ber til, at veita okkara tænastu til grannarnar í Eysturoynni, og tað koma eisini fleiri og fleiri hendanvegin. Roynt verður at bøta um umstøðurnar har tað ber til, menningarskeið fyri leiðarar hava verið hildin, og fara at halda fram í 2018.

# 2. Roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri 2017 er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarin ár.

### Søla

Inntøkur frá sølu av vørum og tænastum eru tiknar við í rakstrarroknskapin í tann mun, avhending er farin fram áðrenn árslok.

### Útreiðslur

Útreiðslur verða rakstrarførdar, tá hesar verða móttiknar og váttaðar sambært váttanarreglum.

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði. Bygningar verða avskrivaðir yvir 50 ár. Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

Í játtanarroknskapinum verða nýútveganir útreiðsluførdar í útveganarárinum uttan mun til kostnaðarvirðið.

### Tænastu-, vøruskuldarar o.t.

Vøru- og tænastuáogn er upptikin til áljóðandi virði. Avseting verður gjørd móti væntandi tapi upp á skuldarar.

## Goymsla

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur goymslu, sum ikki er í fíggjarstøðuni, við tað at játtanar-heimild ikki er til tess. Goymsluvirðið á nýtsluvørum, ið var uppgjørt til kostvirði, var 931 tkr. 31. desembur 2017 í mun til 817 tkr. 31. desembur 2016.

## Millumrokning við Føroya Gjaldstovu

Millumrokning við Føroya Gjaldstovu er netto salda av "Summary 1 Trial Balance. Period; 16-13", S/R kontur nr. 0321 til 0888, tó ikki konta 0360 og 0510.

## Avsettar skyldur

Avsettar skyldur verða tiknar við í roknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint. Nær skyldan ávirkar úrslitið á játtanar-roknskapinum, er treytað av eftir hvørjum meginreglum skyldan er tikin við á fíggjarlóg.

Samsvarandi nýttum roknskaparhátti í landsroknskapinum verða skyldugar starvsfólka-útreiðslur ikki tiknar við í roknskapin uttan so, at er vist, nær upphæddin fellur til gjaldingar og hvussu stór upphæddin er.

## 2.1. Játtanarroknskapurin

Bókingin fer fram á tann hátt, at útreiðslurnar verða bókaðar brutto.

Føroya Løgting samtykti í 2016, at Klaksvíkar Sjúkrahús skuldi hava eina netto rakstrarjáttan upp á 68.672 tkr. í 2017. Nettonýtslan fyri árið varð 68.951 tkr., t.e. 279 tkr. meira enn játtað.

Játtanarroknskapurin er okkara uttanhýsis roknskapur og er uppsettur samsvarandi sundurgreiningini á løgtingsfíggjarlógini undir § 11 Heilsumál.

Í tí dagligu stýringini verður hesin roknskapur ikki nýttur. Til hetta endamál hava vit ein neyvari innanhýsis roknskap, ið er sundurgreinaður í meira sigandi kontobólkar.

**Frávik ímillum játtanarroknskap og fíggjarætlan 2017 eru víst á næstu síðu.**

## Rakstrarjáttan og roknskapur 2017

| | | 2017<br>Roknskapur | 2017<br>Játtan | 2017<br>Frávik |
|---|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan** | | **68.950.953** | **68.672.000** | **-278.953** |
| Útreiðslur | | 73.858.960 | 72.543.000 | -1.315.960 |
| Inntøkur | | -4.908.007 | -3.871.000 | 1.037.007 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | | |
| **Útreiðslur** | | **73.858.960** | **72.543.000** | **-1.315.960** |
| 11 | Lønir v.m. | 56.137.913 | 57.829.000 | 1.691.087 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 16.165.385 | 12.814.000 | -3.351.385 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 196.619 | 1.000.000 | 803.381 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 973.767 | 500.000 | -473.767 |
| 17 | Avskrivingar o.a. | 7.744 | 0 | -7.744 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 375.882 | 400.000 | 24.118 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 1.650 | 0 | -1.650 |
| **Inntøkur** | | **-4.908.007** | **-3.871.000** | **1.037.007** |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -4.172.968 | -3.771.000 | 401.968 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | -658.850 | -100.000 | 558.850 |
| 32 | Útvegan av løgu o.ø. | 0 | 0 | 0 |
| 71 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 119.921 | 0 | -119.921 |
| 75 | Keyps-mvg | 0 | 0 | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -196.110 | 0 | 196.110 |

**Starvsfólkayvirlit**

| | 2017<br>Roknskapur | 2017<br>Játtan | 2017<br>Frávik |
|---|---|---|---|
| Í lønarflokki 37 ella hægri | 3,3 | 4,0 | -0,7 |
| Onnur | 115,6 | 110,0 | 5,6 |
| Fulltíðarstørv | 118,9 | 114,0 | 4,9 |
| Lønarpartur, (t. kr.) | 56.137,9 | 57.829,0 | 1.691,1 |



## 2.2. Fíggjarstøðan 31. desembur 2017

| Ogn | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| **Materiell støðisogn** | | |
| Grundøki og bygningar | 50.874.509 | 53.283.530 |
| **Materiell støðisogn til samans** | **50.874.509** | **53.283.530** |
| **Ogn í umferð** | | |
| Vøru- og tænastuáogn | 1.610.452 | 734.195 |
| Onnur áogn | 311.437 | 59.322 |
| Forskotskassar | 100.000 | 100.000 |
| **Ogn í umferð til samans** | **2.021.889** | **893.517** |
| **OGN TIL SAMANS** | **52.896.398** | **54.177.047** |

| Skyldur | | |
|---|---|---|
| **Útjavningarkonta og millumrokning** | | |
| Útjavningarkonta | -1.141.927.053 | -1.072.976.099 |
| Millumrokning, Føroya Gjaldstova | 1.143.803.052 | 1.073.785.462 |
| Mótkonta til LÚ-roknskap og aðrar broytingar | 50.874.509 | 53.283.530 |
| **Útjavningarkonta og millumrokning** | **52.750.508** | **54.092.893** |
| **Stuttfreistað skuld** | | |
| Onnur skuld | 145.890 | 84.154 |
| **Skuld til samans** | **145.890** | **84.154** |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | **52.896.398** | **54.177.047** |

## 2.3. Eventualskyldur

| Mettur skyldigur kostnaður | Tímar 2017 | tkr. 2017 |
|---|---|---|
| Frítíðargjald, 1,5% | | 346 |
| Feriutímar | 14.314 | 2.648 |
| Serstøk feriuvika | 2.561 | 474 |
| Feriutímar/serstøk frívika ikki hildin 31.12.17 | 5.256 | 972 |
| Tímar til avspákan | 1.786 | 330 |
| Tíðaravmarking av uppspardum tímum | 0 | 0 |
| Netto skyldug vaktargjøld og tænastumannalønir | | 0 |
| **Mettur skyldugur kostnaður** | | **4.770** |

## Leiga av kopimaskinu

Sáttmáli er gjørdur um leigu av kopimaskinu. Sáttmálin kann uppsigast við tveimum mánaða fráboðan. Leigukostnaðurin er kr. 1.442 um mánaðin.

## 2.4. Ársfrágreiðing (tølini)

Ársfrágreiðingin viðgerð í fyrsta lagi fíggjarstøðuna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Síðani verða viðmerkingar gjørdar til einstøku kontobólkarnar í rakstrarroknskapinum.

Innanhýsis roknskapurin (Artskontobólkaroknskapurin) er settur upp í høvuðskonto-bólkar á síðu 16. Frá síðu 14 til 15 er roknskapurin útgreinaður á einstakar konti.

# 3. Váttan frá leiðsluni

Roknskapurin hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi er eftir okkara meting greiddur úr hondum samsvarandi galdandi roknskaparreglum. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi.

Síðan roknskaparárslok er einki hent, sum í týðandi mun hevur ávirkan á roknskapin.

Klaksvík, 28. mei 2018

__________________

Heri Ellingsgaard

Sjúkrahússtjóri

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend av leiðsluni 28. mei 2018.

| | |
|---|---|
| __________________ | __________________ |
| Heri Ellingsgaard | Súsanna Olsen |
| Sjúkrahússtjóri | Varastjóri |

# 4. Váttanir frá óheftum grannskoðara

*Til løgtingsgrannskoðararnar*

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 við nýttum roknskaparhátti, játtanarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir “Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.”.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við “Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.”. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, herundir “Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at stovnurin kann gera ein ársroknskap, sum er rættur, tað vil siga uttan týðandi skeivleikar. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2017 gevur eina rættvísandi mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við “Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.”.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, 28. mei 2018.

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø

*statsaut. revisor*

# 5. Standard- og Artsroknskapur

Í føroysku fíggjarlógini eru játtanir og roknskapir settir upp í Standardformi. Hetta er ein stutt og greið kontoætlan, ið allir almennir stovnar nýta. Við hesi skipan hava allir myndugleikar eina greiða mynd av játtan, nýtslu og gomlum roknskapum hjá stovnunum.

Á einum stovni við nógvum ymiskum aktivitetum, vørunýtslu, lønum o.s.v., er tó neyðugt at gera eitt meira útgreinað yvirlit, so man innanhýsis sær, hvussu støðan er. Tí gera vit tvey sløg av yvirlitum, Standard, sum nevnt, ið øll skulu hava, og so Art til innanhýsis nýtslu.

Roknskapurin í artformi sæst á síðu 16.

## 5.1. Viðmerkingar til roknskapin (artskonto)

Játtanin frá 2016 til 2017 øktist við umleið 1,2 mió. kr. Sum vanligt, er einans talan um játtan til lønarøkingar í rakstrinum. Um annað er á skrá, so verður peningur játtaður til løguna ella ávísa endamálið.

Bólkur 25, lønir, vísir í 2017, at netto lønarútgjaldingarnar eru øktar umleið tað dupulta av framskrivingini. Hetta hevur sjálvsagt sett krøv til restina av rakstrinum.

Í bólki 31, vørur til sjúkraviðgerð og røkt, eru tað servørurnar, t.e. protesir o.a., ið hava staðið fyri eini munandi lægri upphædd enn árið fyri. Hetta kemst av, at goymslan varð stór síðst í 2016.

Í bólki 42, bygningar og grundøki, er eisini ein hampulig upphædd funnin. Har var eisini munandi meira nýtt til viðlíkahald í 2016 enn í 2017.

Í bólki 46, amboð og rakstrargøgn, er triðja stóra upphæddin funnin. Í 2016 vóru umstøður at keypa autoklavu v.m., meðan vit í 2017 hava skorið inn á bein í hesum bólki.

Í bólkunum nevndir omanfyri (31, 42 og 46), er nýtslan góðar 2,0 mió. kr. minni í 2017 enn 2016. Pláss gjørdist soleiðis til lønir og aðrar økingar.

Í onkrum øðrum bólkum varð eisini spart nakað, og onkrar inntøkur høvdu eina øking í 2017.

Bólkarnar har tað øvugta er galdandi, eru serliga bólkur 47, EDV- og skrivstovutól, har peningur er nýttur til teldur og software meðan konsulenttænastan er økt nógv í bólki 52, Keyp av serkønari tænastu.

Nýtslan, í mun til játtan, gjørdist 279 tkr. hægri enn játtanin í 2017, t.e. 0,4% av játtanini.

## 5.2. Artskontobólkaroknskapur

| Artskontobólkaroknskapur | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Bólka-nummar** | **Kontobólkur** | Broyting | 2016 Roknskapur | **2017 Roknskapur** |
| | **Egnar inntøkur** | | | |
| 11 | Inntøkur | -521.251 | -4.302.822 | -4.824.073 |
| 13 | Endurgjøld | 129.850 | -923.988 | -794.138 |
| | **Egnar inntøkur íalt** | -391.401 | -5.226.810 | -5.618.211 |
| **25** | **Lønir** | 2.351.717 | 54.384.224 | 56.735.941 |
| | **Rakstrarútreiðslur** | | | |
| 31 | Vørur til sjúkraviðgerð og røkt | -897.541 | 6.147.282 | 5.249.741 |
| 32 | Kostarhald | 76.011 | 1.570.247 | 1.646.258 |
| 34 | Reinhald og vask | 52.897 | 577.152 | 630.049 |
| 36 | Skrivstovuhald | 56.853 | 700.616 | 757.469 |
| 37 | Bøkur og tíðarrit v.m. | 14.545 | 49.097 | 63.642 |
| 38 | Keyp av orku | -118.334 | 1.776.228 | 1.657.894 |
| 42 | Bygningar og grundøki | -565.703 | 759.485 | 193.782 |
| 43 | Tekniskar innlegginar | 143.358 | 518.297 | 661.655 |
| 44 | Innbúgv | 190.445 | 392.022 | 582.467 |
| 45 | Medicoteknikkur | -3.916 | 836.568 | 832.652 |
| 46 | Amboð og rakstrargøgn | -709.129 | 981.267 | 272.138 |
| 47 | EDV- og skrivstovutól | 256.784 | 758.491 | 1.015.275 |
| 51 | Ferða og flutningsútreiðslur | 235.293 | 1.025.947 | 1.261.240 |
| 52 | Keyp av sakkønari tænastu | 678.929 | 1.771.696 | 2.450.625 |
| 53 | Tryggingar | 67.914 | 222.452 | 290.366 |
| 54 | Socialar veitingar | -122 | 1.797 | 1.675 |
| 61 | Umboðan | -104.549 | 177.604 | 73.055 |
| 62 | Aðrar útreiðslur | -4.033 | 2.761 | -1.272 |
| 69 | Skattur og avgjøld | -977 | 195.490 | 194.513 |
| | **Rakstrarútreiðslur íalt** | -631.275 | 18.464.499 | 17.833.224 |
| | **Úrslit** | 1.329.040 | 67.621.913 | 68.950.953 |

# 6. Hagtøl v.m.

## 6.1. Viðgerðir, innlagdir og ambulantir sjúklingar

| Virksemi | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 1.366 | 1.306 | 1.361 | 1.351 |
| Skurðviðgerðir | 600 | 680 | 667 | 531 |
| Skaðastovuviðgerðir | 2.585 | 2.669 | 2.721 | 3.614 |
| Skurð- og medisinsk eind | - | 5.543 | 5.157 | 4.807 |
| Skurðeind | 3.775 | - | - | - |
| Medisinsk eind | 1.395 | - | - | - |
| Røntgenkanningar | 5.273 | 5.048 | 5.198 | 5.928 |
| *Fys/Ergo viðgerðir | 9.950 | 4.682 | 5.512 | 7.546 |

*Broytt uppgerðarhátt.

| Analysir - rannsóknarstovan | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| Ambulant | 171.174 | 154.199 | 158.921 | 163.407 |
| Innløgd | 17.301 | 20.940 | 22.687 | 24.846 |


Virksemi
12.000
10.000
8.000
6.000
4.000
2.000
0
Innleggingar
Skurðviðgerðir
Skaðastovuviðgerðir
Skurð- og medisinsk eind
Skurðeind
Medisinsk eind
Røntgenkanningar
*Fys/Ergo viðgerðir
2014
2015
2016
2017


Analysur - Rannsóknarstovan
180.000
160.000
140.000
120.000
100.000
80.000
60.000
40.000
20.000
0
2014
2015
2016
2017
Ambulant
Innløgd

## 6.2. Sjúklingar sendir til útlendsk viðgerðarstøð

| Útlendsk viðgerðarstøð | 2017 |
|---|---|
| **Ríkissjúkrahúsið** | |
| Ortopædkir. | 21 |
| Plast kir. | 2 |
| Thorax kirurgisk | 2 |
| Klinik for rygmarvsskader | 1 |
| Afd. For vækst og Repro. | 1 |
| Kar.kirurgisk | 2 |
| **Onnur Sjúkrahús** | |
| Aleris-Hamlet | 3 |
| Gentofte | 1 |
| Hvidovre | 3 |
| Bisbebjerg | 12 |
| Sahva | 3 |
| CFP Hellerup rygcenter | 13 |
| Ålborg Sygehus | 21 |
| Gentofte | 1 |
| Århus Universitetshosp. | 4 |
| Herlev | 4 |
| Glostrup | 3 |
| Ísland | 1 |
| **Sjúklingar tilsamans** | **98** |
| **Fylgjarar** | |
| Avarðandi | 48 |
| Sjúkrarøktarfrøðingar | 2 |
| Læknar | |
| **Fylgjarar tilsamans** | **50** |

## 6.3. Yvirlit yvir sjúklingar

**Býti millum økir**

| | Sjúklingar | % |
|---|---|---|
| Norðoyggjar | 835 | 61,81 |
| Fuglafjørð, Leirvík og Gøta | 156 | 11,55 |
| Onnur økir | 321 | 23,76 |
| Onnur lond | 39 | 2,89 |
| | 1.351 | 100,00 |



## Sjúklingayvirlit pr. deild

| | Íalt |
|---|---|
| Normeraði seingjapláss: | **24** |
| Seingjadagar | **7.275** |
| Seingjadagar 24x365 | **8.760** |
| Færri sengur um summarið | **-168** |
| | **8.592** |

## Yvirlit yvir belegning

| | |
|---|---|
| Innlagdir sjúklingar | **1.351** |
| **Seingjadagar** | |
| Miðal liggitíð | **5,38** |
| Miðal belegningur | **19,93** |
| Belegningsprosent | **84,67** |